# Móttøkan fyri Klæmint

Seinasta fríggjadag varð móttøka í høvuðsskrivstovuni hjá SEV í samband við, at Klæmint Weihe leggur frá sær aftaná eitt sera drúgt tíðarskeið sum stjóri. Her vóru nógvir gestir, eisini úr Danmark. Tað vóru fleiri røður hildnar, har takkað varð Klæmint fyri alt, sum hann hevði gjørt fyri SEV. Hetta hevur longu verið nógv umrøtt, og skal tí ikki endurtakast. Vit vóru við á móttøkuni, har vit hittu ymisk fólk, sum hava havt týdning fyri SEV.

**ó**



*Tað var hugaligt hjá Ketty og Klæmint Weihe at lurta eftir røðunum*



*Jógvan Gerðalíð og Herluf Mortensen, sum arbeiðir hjá SEV sum verkfrøðingur. Jógvan mundi við sínum 91 árum vera ellisforseti á móttøkuni. Hann var sum 14 ára gamal í 1930 saman við pápa sínum við til at sleipa elsteyrar við rossi av sandinum í Klaksvík til nýggja elverkið norðuri við Strond. Akkordin var vist kr. 3,50 fyri steyran*



*Hjørleif og Gidda Wang úr Kaldbak. Hjørleif hevur verið limur í umboðsráðnum*



*Hesir arbeiða hjá SEV á ymiskum økjum: Eyðfinn Hvannastein, teknistovuleiðari, Kristian Fríðrik Olsen, formaður í umboðsráðnum, John Danielsen, skrivstovustjóri og Jørgen Mørkøre, maskinmeistari*



*Palli Mortensen av Tvøroyri er verkmeistari í Suðuroy. Virkini eru í Vági, í Botni og til at taka virkið á Tvøroyri. Virkið í Botni er vatndrivið og framleiðir um ein fjórðing av ravmagninum í oynni*



*Heri Johansen, Christian Martin Christiansen og Páll Mikkelsen eru veteranar hjá SEV. Teir hava arbeitt síni 40 ár í part*

---

†

**Jarðarferð**

Minningarhald verður við urnuna hjá Claus Amondsen leygardagin kl. 13.00 í Kirkjugarðskapellinum.

*Fyri tey avvarandi*
**Lisa Hendriksdóttir**

Tey, ið vilja minnast Claus, kunnu lata børnunum eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa, 9870-102.604.7 .

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Karl Samuelsen**
Kollafirði

gjørdist sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir, uppringingar og peningagávu til Føroya Felag móti krabbameini. Vit takka presti, kirkjutænarum, sangarum og gravarum.
Vit takka heimasjúkrasystrum og starvsfólki á G4 á Landssjúkrahúsinum. Eisini takka vit tykkum, sum vitjaðu Karl, meðan hann var sjúkur.
Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein stór tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til við ervinum.

*Familjunnar vegna*
**Elsa**
**Anna Rúna, Signa, Kára og Niklas**